# Leirvíkingur á bygd í stórb

**Høgni Lisberg er júst fluttur í nýggja íbúð, hevur givið nýggja fløgu út og um tvær vikur skal unnustan eiga teirra fyrsta barn. Vit hittu 23 ára gamla leirvíkingin í føroysku bygdini á Amager, Oyrasundskollegiinum**

FLØGUÚTGÁVA
*Orð: Niels Uni Dam*
NIELSUNI@SOSIALURIN.FO
*Mynd: Símun Jóannesarson*

Kanska mest eftirbíðaða fløgan seinnu árini “Morning Dew” hjá Høgna Lisberg er nú endiliga komin í handlarnar. Eg hitti 23 ára gamla leirvíkingin á Oyrasundskollegiinum á Amager, har hann saman við unnustuni júst er fluttur í nýggja og størri íbúð. Um tvær vikur er unnustan sett til at eiga teirra fyrsta barn, og tí gjørdist tveyrúma íbúðin ov lítil. Høgni og ein vinmaður mála gomlu íbúðina, tá eg komi á gátt.

## So erligt og sjarmerandi

Fyrra fløgan hjá Høgna “Most beautifull things” kom út í desember 2003. Fløgan var framúrskarandi, við frálíkum løgum sungin og spæld við nógvari innliving og sjarmu. Hetta hevði við sær, at fløgan gjørdist næst mest selda fløga hjá plátufelagnum Tutl í 2004. Høgni er gávuríki trummuleikarin í Clickhaze. Hann er so ótrúliga musikalskur og spælir gittar og syngur bæði á fløgunum og konsertum. Røddin er egin, og hóast hann hvørki er Pavarotti ella Eivør, so er útrykki so erligt og sjarmerandi, at tú noyðist at elska røddina. Trummurnar eru ikki lagdar á hyllina, og hann spælir eisini trummir á báðum fløgunum, men live spælir hann ofta uttan trummuleikara.

## Herdaður av at bíða

Meðan vinmaðurin málar víðari, royna eg og Høgni at finna eitt stað, har vit kunnu seta okkum uttan, at farteldan ella eg verða smurd alt ov illa inn í máling. Høgni tykist á onkran hátt eitt sindur friðsælur. Hann greiðir frá, at nú er eitt ár síðan, at hann fór undir at fyrireika fløguna. Ætlanin var, at hon skuldi koma í februar, so hann kennir seg herdaðan av at bíða.

Hann sigur, at honum dámar væl á Oyrasundskollegiinum, har hann livur millum nógvar føroyingar, í tí sum mest minnur um eina føroyska bygd í Keypmannahavn. Tað er sera praktiskt at búgva í Keypmannahavn, tá hann spælir í útlandinum. Hetta sparir ferðaseðilin úr Føroyum, og hetta ger tað nógv betri møguligt at fara uttanlandað, tildømis til Sveits. Høgni hevur verið á fleiri konsertferðum í Sveits, og sambært tónleikarunum í sveitsiska bólkinum Sundiver, ið vitjaði í Føroyum herfyri, er Høgni ein sonn stjørna í Sveits. Hetta heldur Høgni vera nakað yvirdrivið men sigur, at tað hevur gingið væl í Sveits, og fjølmiðlarnir hava verið við uppá tað. Sveits er ein marknaður hann ætlaður sær at royna seg á við nýggju fløguni. Sum marknaður minnur Sveits um Danmark, tað er nokkso yvirskoðiligt, sigur Høgni. Umboðsmaðurin hjá Høgna roynir í løtuni at fáa eina avtalu við okkurt bookingfelag í Sveits, umframt eitt útgávufelag at geva ”Morning Dew” út har.

## Vildi sleppa undan Óla Poulsen

Upprunaliga skuldi fløgan ljóðblandast í Belgia av Luc Van Acker. Men hetta fór í fisk, og nú 10 mánaðar seinni, stendur navnið hjá Luc Van Acker sum upptøkutøkningur av nøkrum røddum og gittarum á fløguni, meðan føroyski Óli Poulsen hevur ljóðblandað.

Høgni sigur, at orsøkin til at hann valdi Luc Van Acker, var royndin at fáa fløguni at ljóða annarleiðis. Flestu føroysku fløgur verða ljóðblandaðar av Óla Poulsen, tí var tað eitt sindur óinteressant. Høgna dámar væl at finna nýggj fólk at arbeiða við, soleiðis at hansara fløga ljóðar annarleiðis. Hetta var eisini orsøkin til at fyrra fløgan varð ljóðblandað í Onglandi. Høgni leggur dent á, at hetta ikki hevur nakað at gera við ónøgd við Óla Poulsen, sum jú er fremsti føroyski ljóðblandarin. Tí var tað eisini

